**Janusz Korczak og børnini.**

Tá dóttirin á heysti 2019 slapp at verða partur av einum toymi hjá Barnabata, sum skuldi varpa ljós á rættindi hjá børnum, kom eg at hugsað um ein mann eg hevði hoyrt um, og hevði sæð á mínum óteljandi ferðum til Pólands. Eg fortaldi henni, at á jødiska kirkjugarðinum í Warsawa stendur ein standmynd av honum; hattleysur berandi eitt barn og leiðandi fleiri onnur. Maðurin var Janusz Korczak, og stóra fyrimyndin fyri grundleggjandi rættindini hjá børnum, sum fyrst vóru niðurfeld í Pólandi í 1959, og sum vóru staðfest av ST í 1989. Naglabundna lagnan er ein veruleiki, og sannleikans stund er fyri stavn. Størsta fólkamorð í søgu menniskjans



*1 Minnismerki av Janusz Korczak á jødiska kirkjugarinum í Warsawa*

Onkursvegna kenni eg meg als ikki hava rætt til at tosa um Holocaust, men kanska kann hetta verða eitt klípi, við bara tað at minnast at tað hendi. Vit kunnu royna at lýsa tað, men til fulnar skilja vit tað ikki. Ísraelski søgufrøðingurin Gideon Greif sigur tað nokk so væl. **Um so øll trø í verðini vórðu til pennar, og høvini vórðu *til áir av blekki, ber ikki til at skriva um tað, og fult út sanna, hvat veruliga hendi undir Holocaust***

**Søgan.**

Í 1933 er nazistaflokkurin undir leiðslu av Adolfi Hitler komin til valdi í Týsklandi.

Í tí nazististisku samfelagsáskoðanini og verðinsmynd fylgdi ein klettatrúgv á, at tann ariska rasan (tvs tann týska) var meira ment  enn allar aðrar rasur og fólkasløg. Tey høvdu eina neiliga áskoðan  á onnur fólk og rasur, og serliga jødarnir vóru ein trupulleiki í teirra eygum. Teir týsku jødarnir kendu seg sum týskara, og uppførdu seg eisini sum týskara, men nazistarnir og Hitler sóu niður á teir, og ynsktu uppá allar mátar at skaða teir. Í fyrstu atløgu vóru teir stemplaðir sum ikki týskara, men 15. september í 1935 vóru fleiri mismunandi lógir settar í gildi, fyri at skaða jødarnar; tær sokallaðu **Nürnberglógirnar**.

Nazistarnir royndu fyrst at taka øll rættindi frá jødunum, fyri síðan at noyða teir at rýma úr Týsklandi. Seinni forfylgdi nazistarnir jødarnir enn meir, og oyðiløgdu meginartin av teirra ognum á Krystalnáttini í november 1938. Øll tey sum kundu flýddu úr týsklandi, men nógvir jødar vóru eftir, við tað at teir ikki høvdu ein møguleika at flýggja. Eitt annað, sum kanska eisini er relevant í dag er, at onnur lond í Europa ikki vildu taka ímóti jødunum, so á ein hátt vóru teir settir skákmát. Og tað er ræðandi at hugsað sær, at vit í Føroyum undir flóttafólkakreppuni í 2015 høvdu løgtingsfólk við herrópinum ”Onki flóttafólk til føroyar takk”! Grundgevinging var, at flóttafólkini ikki kundu tilføra føroyska samfelagnum nakað munagott! Og Adolf Hitler hevði ein dreym um, at har tað søguliga sæð høvdu búð týskara, og har tað í 30-unum búðu týskara; har skuldu hann og nazistarnir nú ráða. Hann vildi tískil eitt týskt dominera Europa- eitt týskt lívøki – sokallað

Lebensraum. Ein onnur orsøk til tað týsku nazistisku víðkanina av øki var tørvurin á rávørun og øðrum tilfeingi, sum Týskland ikki sjávt ráddi yvir.

Tann týski víðkanarhugurin gekk allarfyrst útyvir Eysturríki, sum bleiv hertikið, ella innlima týska ríkið 1938. Tað sama gjørdi seg galdandi fyri Kekkia í tveimum umførum (1938 og 1939) Umheimurin gjørdist av hesum ikki sørt ekkafullur yvir, hvat teir týsku nazistarnir kundu finna uppá, men vónaði at man kundu sleppa undan einum kríggi. Týskland og Sovjetsamveldi, sum annars vóru sera mistrúgvin móti hvørjum øðrum, funnu saman og samdust um ein ikki-álopssáttmala í august 1939. Í hesum sáttmála var eisini ein loynilg avtala millum partarnar at leypa á Póland og býta landið millum sín, saman við øðrum grannalondum.

**Álopi á Polen í september 1939**

1. september í 1939 leyp tað nazistiska Týskland á grannalandi Póland. Men Póland hevði eina avtalu við Ongland og Frakland um hjálp, um so vildi til at landi var álopi. Londini hildu sína avtalu og 3. september 1939 bjóðaðu Ongland og Frakland Týsklandi av, og 2. veraldarbardagi var ein veruleiki. 17. septembur leyp Sovjetsamveldi eisini á Póland, og tá september mánaði var við at halla, var Póland noytt at geva seg yvir.

Póland var býtt sundur í tvinnar lutir; ein russiskan og ein týskan. Vestur Póland varð innlimað í tað Týska Ríki, og eystur Póland kom undir russiskt harradømi. Mið-Póland kom undir eina sokallaða týskt stýrda Høvuðslandsstjórn. Meir enn 2 milliónir polskir jøda búðu nú í teimum týskt stjórnaðu umráðunum. Jøda hatri hevði fingið veruligar fastatøkur. Og longu 12. Oktober sama ár, var lógin um at bera armband við tí gulu David stjørnuni samtykt. Teir pólsku jødarnir vórðu gjøgnum fyrstu mánaðirnir í 1940 samlaðir í serligar býarpartar og býlingar, sokallaðar **Ghettoir**

Tann fyrsta av slíkum slag, varð ghettoin í Warsawa, sum tá tað var mest av fólki, húsaði yvir ½ millión jødum á 7.000 fermetrum. Fyri pólsku jødarnar var støðan í hesum ghettoum ræðulig: hungur, sjúka, kuldi og hart tvingsilsarbeiði tók lívið av nógvum. Og harðast gekk tað yvir børnini og tey eldru.

Summari 1941 leyp Týskland á Sovjetsamveldi, og harvið komu enn fleiri jødar undir týskt harradømi. Teir nógvu jødarnir gjørdust ein størri og størri trupulleiki fyri teir týsku nazistarnir. Og sum 1941 leið, var ein ætlan klár og var hon endaliga staðfest á Wannsee-fundinum den 20. januar 1942. Ein endalig loysn á Jøda trupulleikanum – **Die Endløsung**.

Endaliga loysnin umfataði tvingsilsarbeiði og týning í serligum fangalegum. Allar ognir vóru tiknar frá jødunum í teimum hertiknu londunum. Síðan vóru tey send í ghettoir, síðan send til legurnar, har tey antin vóru send til hart arbeiði ella vóru førd til gasskømruni, har tey vóru dripin í somu løtu tey komu.

Størsta og ræðuligasta legan var Auschwitz, sum lá í núverandi suður Pólandi; ikki langt frá býnum Krakow. Her vóru meir enn 1,1 millión menniskju myrd í tíðarskeiðnum 1941 – 1945. Størsti parturin jødar. Lívið í Ghettounum var trupult og ræðuligt, men frá sumri 1942 skuldu jødarnir eisini fyrihalda seg til teir mongu tvingsilsflutningarnir til týningarlegurnar, og sum við tíðini tømdu ghettoirnar. Frá 1942 – 1943 vóru á leið 2 milliónir polskir jødar gassaðir og dripnir í ymsum týningarlegum. Sum teir seinastu vóru 80.000 jødar í 1944 tvangsfluttir úr ghettoini í Lodz til Auschwitz.

**Ghettoirnar**

Tær jødisku ghettoirnar í tí hersetta Pólandi vóru upprunaliga hugsaðar til eina planlagda flytan av teimum polsku jødunum. Í fyrstu atløgu var ætlanin at gera eitt sokallað "jøda-øki" í eystar partinum av Høvuðslandastjørnar umráðinum (Lublin ætlanin). Seinni í 1940 kom so ein nýggj ætlan um at flyta allar jødar sum vóru undir nazistiskum valdið til oynna Madagaskar uttanfyri eysturstrondina í Afrikan. Bæði Lublin ætlanin og Madagaskar ætlanin vóru treytaðar av, at teir polsku jødarnar vóru samlaðir í serligum umráðum, har teir lætt kundu flytast í stórum tali, tá ætlanin skuldi gjøgnumførast. Jødarnir vóru tískil tvungnir til at flyta til býirnar, og stutt eftir eisini til serligar býarpartar. Serliga í Warsawa og í Lodz uppstóðu stórir jødiskir býarpartar. Sum frá leið, vóru hesir býarpartar stongdir av frá restina av býnum. Harvið vóru ghettoirnar skaptar. Hesar ghettoir vóru av nazistunum mett sum en fyrisbils loysn. Nazistarnir vildu við hesari sokallaðari ghettosering av teimum polsku jødunum tryggja sær, at teir kundu flyta teir skjótt, tá tíðin til tað kom. Harafturat vildi man avbyrgja jødarnir frá hinum landsins íbúgvum, og noyða teir at geva frá sær teirra krambúðir, handlar, ognir v.m. Eins og tað var í Týsklandi var ætlanin, at jødarnir skuldu hvørva frá vanliga gerandisdegnum. Harnæst vóru nazistarnir ræddir fyri sjúku og farsóttum, og vónaðu at sleppa undan teimum størstu smittuberunum (jødunum) við at avbyrgja teir.

At ghettoirnar vóru fyribils loysnir merkti, at jødarnir sjálvir máttu gjalda teirr mat, uttan at hava møguleika fyri at vinna sær pening. Nazistarnir vildu noyða jødarnar at brúka teirra seinastu oyru og onnur virðir, við at tvinga teir at keypa sín egna mat og aðrar neyðsynjar vørur. Polsku jødarnir vóru ikki serliga vælhavandi, so eftir stutta tíð í ghettoini byrjað hungur og hall og neyð at vísa seg.

Teir týsku nazistarnir sóu skjótt, at ghetto ætlanirnar ikki vóru serliga hóskandi, og byrjaðu tískil at leggja nýggjar ætlanir at loysa jødiska trupulleikin. Í fyrstu atløgu vóru ghettoirnar lukkaðar heilt við múrum og píkatráði, soleiðis at jødarnir ikki sluppu út. Hetta eisini fyri at tann vanligi pólendingurin ikki skuldu síggja, hvussu jødarnir høvdu tað í ghettounum

Størsta polska ghettoin var sum áður nevnt Warsawa ghettoin, og sum stóð liðug 1941, og sum húsaði 500.000 jødum. Í Warsawa avgjørdu nazistarnir, at jødarnir máttu arbeiða fyri føðina. Og svongd var ein sera stórur trupulleiki. Jødarnir fingu bert 183 kaloriur at liva av dagliga. Og um teir fingu mat ella ikki, var ofta treyta av vælvilja frá nazistunum. Veitingarnar av mati vóru sera knappar og óregluligar, og hungur deyði hoyrdu til dagsins óskil í ghettoini. Væntandi maturin viðførdi loynihandil og smugling. Sjálv matrestir og husdjór vóru keypt og seld fyri pening.

**Ghettoirnar verða niðurlagdar**

Aftaná at nazistarnir lupu á Sovjetsamveldið um summari 1941, komu rættuliga nógvir nýggir jødar undir týskt nazistiskt vald. Uppruna hugskotið hjá nazistunum um at tvingsilsflyta jødarnar bleiv nú slept. Nú vóru boðini, at allir óabeiðsførir, herímillum kvinnur og børn skuldu drepast. Teir jødar sum kundu arbeiða, sluppu at liva, so leingi tey vóru sunn og røsk. Tá hesi viknaðu, skuldu tey eisini drepast. Frá ymsum heraðshornum í Europa byrjaðu nazistarnir at senda jødarnar eystureftir, m.a. til Póland. Og fyri at fáa pláss til teir nýggjur jødarnar, varð tað orsakað av plásstrotið neyðugt at beina fyri teimum veikastu, sjúku, óarbeiðsføru og børnunum.

**Hópmorð á jødarnar**
Samstundis sum man flutti fleiri og fleiri jødar eystureftir og harvið eisini tømdu tær polsku ghettoirnar, arbeiddu teir týsku nazistarnir við ymsum ætlanum, um hvussu man kundi beina fyri jødunum og øðrum útskotum (Sigoynara, samkynd, sálarsjúk v.m.) í størri tali. Á heysti 1941 komu nazistarnir fram til, at tann munabesti mátin at beina fyri størri tali av fólki var at gassa tey. Fyrsta hópmorði á jødar við gassi fór fram í tí nýbygdu týningarleguni Chelmno í december 1941. Hetta vóru óarbeiðsførir jødar frá ghettoini í Lodz.

Í byrjanini av 1942, aftaná tann kenda Wannsee fundin, sum var leiddur av Reinhard Heydric; ovastanum fyri týsku trygdarløgregluna, var endaliga loysnin á jødatrupulleikanum løgd fyri dagin. Við «**OPERATION REINHARD**» byrjaðu teir týsku nazistarnir at tøma og rudda tær polskt-jødisku ghettoirnar. Jødarnir vóru sendir til sokallaðar týningarlegur, har teir blivu gassaðir. Í Høvuðslandstjórnini, vóru triggjar týningarlegur reistar; **Belzec, Sobibor og Treblinka**. Hesar legur høvdu eittans endamál, og tað var at týna teir polsku jødarnar. Og í tíðarskeiðnum 1942-1943 vóru næstan 2 milliónir jødar gassaðir til deyðis í hesum legum.

Fyrsti flutningurin av jødum úr Warszawa ghettoini var 22. juli 1942. Alment var sagt, at jødarnir skuldu flytast til at arbeiða uttanfyri ghettoina, men í veruleikanum vóru teir á leið 5000 jødarnir fluttir beinleiðis til Treblinka og gassaðir til deyðis. Og næstu 2 mánaðirnar vórðu á leið 350.000 jødar úr ghettoini í Warsawa dripnir á hendan hátt. Og tá kríggið var av, vóru á leið 2,7 mill jødar deyðir í týningarlegum í Polen.

**Korczak**
Mitt í hesum menniskjaliga helviti á jørð, inni í Warsawa ghettoini, brann eitt lítið ljós yvir tilveruna. Hetta lítla ljós var rithøvundurin og lærarin Henryk Godszmit, betri kendur við sínum polska navni Janusz Korczak. Korczak var jødiskur polskur barnalækni, rithøvundur og lærari, og leiðari á einum barnaheimi í Warsawa í tíðarskeiðnum 1912 til 1942. Hann var serliga kendur fyri sína áskoðan á tað einkulta menniskja, og fyri sína djúpu virðing fyri sínum børnum og teirra rættindum. Stary Doktor – tann gamli læknin var hann kallaður. Á sínum barnaheimi, sum hann var leiðari fyri, saman við kvinnuni Stefania Wilczynska – Stefa, setti hann á stovn barnana egna dómstól. Her vóru børnini uppald til at døma uppbyggiligar dómar, fyri ymisk brot á reglurnar á barnaheiminum. Hann setti á stovn eitt barnaparlament, har barnana lógir vóru samtyktar. Og børnini høvdu sítt egna blað á heiminum. Til tíðir høvdu tey barnasjónleik, sum var óvanligt tá í tíðini. Bæði kendir sjónleikir, og eisini sjónleikir, sum børnini sjálv høvt evnað til. Korczak skrivaði bøkur til børnini; oftast ævintýr sum kundu fortelja børnunum um lívsins loyndamál, vandar og avbjóðingar. Eisini hevði hann eitt barnaútvarp, men ta var steðga av myndugleikunum. Hann var talsmaður fyri, at børn vóru viðfarin við somu virðing sum vaksin, og við somu rættindum sum vaksin.

Tá Nazistarnir hertóku Póland, og byrjaðu at flyta jødarnar í ghettoir, var barnaheimi hja Korczak og Stefu eisini flutt inn í ghettoina í Warsawa. Í fyrstani húsaðust tey í Chlodnagøtuni nr. 33, og seinni í Sienna gøtuni nr 16. Við tí hungri og halli sum valdaði í ghettoini, gekk Korczak støðugt runt og biddaði mat og heilivág til børnini. Vinir Korczak bjóðaðu seg til at smugla hann út úr ghettoini, men hann vildi heldur verða har, hjá sínum børnum. Og tann 5. august í 1942 var tíðin komin til Korczak, Stefu og børn teirra; 196 børn. Ein drongur, sum búði á barnaheiminum, hevði eina fiól. Hann spældi og hini sungu, meðan tey øll fóru úr ghettoini yvir til **Umschlagplatz**, sum var staðið har jarnbreytarvognarnir stóðu og bíðaðu. Børnini vóru í sínum bestu klæðum.



*2 Umschlagplatz minnismerki í Warsawa.*

Korczak hevði fortalt fyri børnunum, at tey skuldu út á bø-landi, og sluppu úr ræðuligu og trongu korunum í Ghettoini. Nú skuldu tey út í náttúruna, nú skuldu tey øll fegnast og vera glað. Og hann bað tey hava eina dukku, ella eina leiku ella eina bók við, fyri at halda mótinum hjá teimum uppi.

***Tað var eins og eitt kraftarverk. Tey smáu tvey hundrað børnini grótu ikki. Tvey hundað reinar sálir, dømdar til deyðis grótu ikki. Og onki av børnum royndi at rýma. Og ongin roynidi at goyma seg. Sum smáir svalar hildu tey seg tætt at sínum lærara, ráðgeva, pápa og bróður Janusz Korczak, so hann kundi verja tey. Janusz Korczak gekk, við upprættum høvdi, við einum barni í fanginum, leiðandi eitt annað. Uttan sín hatt, við einum leðurbelti um miðjuna og við langum svørtum leðurstyvlum. Stefa og nøkur hjálparfólk av barnaheiminum vóru eisini saman við børnunum. Á báðum síðum vøru hermenn og politistar. Tað var sum um tey vøru borin til altari at doypast. Og sjálvt gøtu steinarnir og flisarnr grótu hendan dagin, skoðandi hesa barna*** **skrúðgongu** (*Joshua Perle, eygnavitni*)

Korczak og børnini blivu send til týningarleguna Treblinka, har tey øll blivu gassaði og dripin í somu stund tey komu til leguna. Og hann fylgdi barnaheims børnunum trúfast tann seinasta teinin til gasskamari.

Hansara tilgongd til barnauppaling í eftirkrígstíðini hevur givið íblástur til lógarsmíð til fyrimuns fyri børnini. Og ikki óvæntað var tað júst Póland, sum gjørdist ein virkin stuðulsveitari og stigtakari at fyrireika eina kunngerð um barnarættindi í 1959. Og 30 ár seinni var Barnarættindasáttmálin viðtikin á ST aðafundinum í New York í 1989. Og hann er eisini í gildi í Føroyum.



*3 Minnismerki um Janusz Korczak og børnini i Holocaust minnislundini í Jerusalem*